# Afturgongdin hjá mær var ein álitisváttan

**At eg misti so nógvar atkvøður, taki eg avgjørt sum eina álitisváttan um, at veljarin vil hava meg at verða verandi í Tinganesi, sigur Jóannes Eidesgaard**

FÓLKATINGSVALIÐ 2005
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg haldi, at vit hava betalt prísin fyri teir trupulleikar, sum eru í samfelagnum.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður og formaður javnaðarfloksins, fekk ikki ta úrslitið á fólkatingsvalinum týsdagin, sum hann hevði vónað.

Javnaðarflokkurin gekk aftur og sjálvur fór hann úr 3676 atkvøðum á valinum í 2001, niður í 1183 atkvøður týsdagin.

– Eg haldi, at tað er afturgongdin í samfelagnum, sum hevur rakt okkum. Hinvegin er tað ein sannroynd, at teir flokkar, sum hava sitið við landsins leiðslu í seks ár gingu fullkomiliga fríir og vunnu valið.

– Eg havi staðiliga víst á, at kreppan í samfelagnum er ikki íkomin síðani í februar 2003, tá ið vit komu í samgongu, men kortini hevur veljarin valt at revsa okkum, sigur løgmaður.

Sjálvur dugir hann ikki at finna nakra aðra, skilagóða frágreiðing.

– Eg haldi, at vit hava ført eitt gott valstríð og vit hava staðið okkum minst líka væl sum hinir flokkarnir. Tí finni eg onga aðra frágreiðing, sigur løgmaður enn veljarin hevur latið ónøgdina við ymisk viðurskifti í samfelagnum ganga útyvir okkum.

– Tað vísir seg sum um at politikkur er soleiðis háttaður, at veljarin tekur bara útgangsstøðið í støðuni, sum hon er í løtuni, tí tí hevur hann latið javnaðarflokkin betalt prísin fyri tey viðurskifti í samfelagnum, sum ikki ganga eftir vild.

Løgmaður hugsar um støðuna í Suðuroynni, kreppuna í rækjuflotanum og afturgongdina í fiskivinnuni sum heild.

– Hetta hava vit sæð fyrr, tí í kreppuni í 1994, fór javnaðarflokkurin í helvt. Hinvegin er fólkaflokkurin eisini í samgongu og skuldi tí verið í somu støðu sum javnaðarflokkurin. Men hann vann valið.

Løgmaður heldur forkláringin uppá tað kann vera, at veljarin kring alt landið hevur brúkt hetta høvið til at geva Arnfinni Kallsberg ta uppresin, sum Norðoyar góvu honum á løgtingsvalinum.



*– Vit hava betalt prísin fyri trupulleikarnar í samfelagnum, men teir, sum hava sitið í landsstýrinum í seks ár frammanundan, gingu fullkomiliga fríir, sigur Jóannes Eidesgaard*

### Afturgongdin ein álitisváttan

At løgmaður sjálvur misti yvir næstan 2500 atkvøður, tekur hann ikki so tungt.

– Tað taki eg avgjørt sum eina álitisváttan, tí við hesum hevur veljarin givið greitt til kennar, at hann vil hava meg at verða verandi í Tinganesi.

Hinvegin havi eg alla tíðina boðað frá, at eg tók mína uppstilling sum ein stuðul til flokkin og skuldi eg verðið valdur, hevði eg ikki farið á fólkating kortini, tí eg eri løgmaður.

– Tí hevur valið hjá javnaðarflokkinum alla tíðina snúð seg um, hvør skuldi verða nummar tvey á listanum og hvør sostatt kundi farið á fólkating. Tað var væntandi, tí veljarin vil ikki, at atkvøðan fer fyri einki við at atkvøða fyri meg og tí hevur veljarin meiri hugsa um, hvør varð nummar tvey og sostatt kundi fara á fólkating.

Oftani verður tosað um »løgmanseffektina« har starvið sum løgmaður eisini ger, at flokkurin vinnur atkvøður.

– Eg haldi ikki at hetta er so. Tá ið Anfinn Kallsberg var løgmaður, fekk hann bara ein brotpart av atkvøðunum til fólkatingsvalið, sum hann fekk, nú hann ikki er løgmaður longur og tað sama hava vit sæð í øðrum førum.

### Anfinn verður hentur

Hóast løgmaður er vónbrotin av, at javnaðarflokkurin ikki fekk fólkatingslimin, fegnast hann um, at samgongan fekk ennað umboðið.

– Tað standa truplar samráðingar fyri stavn, sum hava alstóran týdning, so tað fer uttan iva at vera hent at hava ein samgongumann í fólkatinginum.

Í hesum sambandi hugsar løgmaður um yvirtøkulógina og uttanríkispolitisku heimildirnar,

Hinvegin verður tað meiri ivingarsamt, hvønn leiklut Høgni Hoydal fer í hesum sambandi.

– Ta tíðina, eg sat í fólkatingi, var javnaðarflokkurin í andstøðu í løgtinginum. Hóast eg ferð eftir ferð bjóðaði meg fram til at vera landsstýrinum til hjálpar, fekk eg ikki eina tað einastu áheitan um at tað.

– Men hóast undanfarna landsstýrið hevði tað støðuna, ætli meg mær at síggja støðuna øðvísi og tað kann væl henda, at eisini Høgni Hoydal fer at fáa áheitanir um at samstarva við landsstýrið um ymisk mál á fólkatingi, sigur Jóannes Eidesgaard.

# Vit herja á aftur við fullari megi

**Tað sær út til at sambandsflokkurin verður revsaður fyri ósemjur í flokkinum, men at tjóðveldisflokkurin skorar kassan, sigur Kaj Leo Johannesen**

FÓLKATINGSVALIÐ 2005
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta var ikki gott. Men tá ið vit hava slokt sárini í nakrar dagar, herja vit á aftur við fullari megi.

Kaj Leo Johannesen, formaður sambandsfloksins, er alt annað enn nøgdur við úrslitið av fólkatingsvalinum.

Sambandsflokkurin var stóri taparin á fólkatingsvalinum týsdagin. Á fólkatingsvalinum í 2001, fekk hann 27,3 % av atkvøðunum og ein fólkatingslim. Týsdagin fekk hann bara 21,4 % av atkvøðunum. Sostatt misti hann 5,9% av atkvøðunum og fólkatingsmannin.

Kaj Leo Johannesen hevur onga eintýðuga forkláring uppá, hví tað gekk so illa.

– At fáa líka gott úrslit sum í 2001, var ikki væntandi, men eg hevði vónað, at vit lendu á eini 23%.

Onkusvegna heldur hann, at flokkurin hevur goldið fyri at sita í samgongu, men hann dugir ikki at seta fingurin á nakað ávíst, tí hann heldur flokkurin hevur gjørt eitt gott arbeiði í landstýrinum.

Hann dugir heldur ikki at vísa á nakað ávíst í valstríðnum, sum er kiksað.

– Valluttøkan var nógv minni hesuferð enn seinast og tað vísir seg, at ein lág vállutt øka er ikki góð fyri sambandsflokkin. Hinvegin vísir tað seg ofta, at er valluttøkan høg, stendur sambandsflokkurin seg eisini væl.

Hví tað er so, veit formaðurin ikki, men onkusvegna eydnaðist ikki at fáa kjarnuveljararnar hjá flokkinum á val hesuferð.




*– Eg havi bara verið floksformaður í eitt ár, men eg haldi, at eg eigi at fáa eina rímiliga tíð til at byggja flokkin upp. Tí havi eg ongar ætlanir um at leggja frá mær, sigur stóri taparin á fólkatingsvalinum, Kaj Leo Johannesen, formaður sambandsfloksins*

### Rembingar hava verið dýrar

Formaður sambandsfloksins heldur, at ein orsøk til afturgongdina er, at Lisbeth Petersen, sum var ein stórur profilur, ikki stillaði uppaftur hesuferð.

– Harafturat skerst ikki burtur, at á valinum í 2001, var ein kraftig polarisering ímillum loysing og samband og tað gav tjóðveldinum og sambandinum hvør sín fólkatingslim.

Kaj Leo Johannesen heldur, at nú er hendan polariseringin dovnað nakað. Og somuleiðis skerst ikki burtur, at rembingar hava verið í sambandsflokkinum, sum kanska hava fingið veljaran at setast aftur.

Hann hugsar ikki um rembingarnar, tá ið Heðin Mortensen fór úr flokkinum eftir býráðsvalið.

– Eg standi framvegis við avgerðirnar, sum vórðu tiknar tá, tí tað hevur størri týdning at varðveita trúvirði enn tað hevur at varðveita Heðin Mortensen. Tað vísir seg heldur ikki at tað hevur kostað sambandsflokkinum nakað serligt. Undir øllum umstøðum hevur tað ikki hjálpt javnaðarflokkinum, at hann arvaði Heðin Mortensen.

Tá ið Kaj Leo Johannesen tosar um rembingar hugsar hann meiri um tað, sum fór fram, tá ið Johan Dahl noyddust úr landsstýrinum. Tað heldur hann hevur skatt flokkin.

– Í so máta haldi eg, at tjóðveldisflokkurin hevur eitt heilt annað slag av veljarum. Hóast polariseringin ímillum loysing og samband er dovnað, hevur hann varðveitt atkvøðurnar. Og ímeðan tað sær út til, at vit verða revsaðar fyri tær rembingar, sum eru í flokkinum, sær út til, at tjóðveldisflokkurin vinnur við tað, tí har hava sanniliga eisini rembingar verið.

### Ætlar sær ikki frá

– Kanska hevur tað ikki eydnast okkum at fáa boðskapin nóg greitt fram. Og tað taki eg, sum formaður, á mín kappa.Tað hevur ikki eydnast nóg væl at fáa okkara kjarnuveljarar áupp úr sofuni og tað skal gerast betri næstu ferð.

Men Kaj Leo Johannesen vil ikki hoyra talan um at siga seg frá sum formaður.

– Eg havi sitið í eitt ár og eg læri alla tíðina. Eg haldi eisini, at tað er rímiligt, at ein formaður fær ein veruligan møguleika at byggja flokkin upp og tað gerst ikki upp á eitt ár.

– Sjálvandi gevur eitt úrslit sum hetta orsøk til sjálvrannsakan. Ein flokkur skal altíð rannsaka seg sjálvan og vit fara nú at lýsa støðuna og so herja vit á aftur.

Sjálvur er Kaj Leo Johannesen sera takksamur við atkvøðurnar, hann sjálvur fekk. Hann fekk 1129 atkvøður hesuferð. Seinast hevði hann 319.

At hann kom at liggja aftanfyri Edmund Joensen, sum fekk yvir 1300 atkvøður, tekur hann ikki so tungt.